## Eimskip aftur hall

Íslendska flutningsfyritøkan Eimskip hevði 5,6 mió. evrur í halli teir tríggjar mánaðarnar frá 1. november í fjør til 31. januar í ár. Tað er hóast alt frægari enn somu tríggjar mánaðir eitt ár frammanundan, tí tá var hallið 8,3 mió. evrur, skrivar Morgunblaðið. Magnús Torsteinsson, nevndarformaður, sigur við blaði, at úrslitið frá 1. november í fjør til 31. januar í ár var tað, sum leiðslan hevði væntað, og at nú gongur rætta vegin.

## Hulin løgregla

Seinasta fríggjadag doyði ein 52 ára gamal maður, meðan hann var í varðhaldinum á løgreglustøðini í Esbjerg. Síðani hava tey avvarðandi hjá manningum roynt at fáa at vita, hví og hvussu hann doyði, men sambært JydskeVestkysten vil løgreglan einki siga. Tey avvarðandi hava tí biðið ein sakførara taka sær av málinum. Hann sigur við blaðið, at tey avvarðandi vilja sjálvandi hava at vita, um maðurin doyði fyri egnari hond ella á annan hátt.

# Umráðandi at fáa sum mest burtur úr svartkjaftinum



**- Eg havi við stórum áhuga – og at kalla hvønn dag - fylgt við gongdini hjá Atlantic Navigator, og tað er sera harmiligt, um henda vinna við framleiðslu av surimi úr svartkjafti nú dettur niðurfyri. Tað er umráðandi, at svartkjafturin, ið er eitt stórt tilfeingi, fer til ymisk endamál, tí hetta ger, at vinnan verður meira fjøltáttað, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya fólk stendur spyrjandi, hví Atlantic Navigator veruliga fer úr Føroyum í heyst.

Í tíðindafráboðan sigur reiðarin, Hanus Hansen, at ”ein tann størsta orsøkin til avgerðina er tann ótryggleiki, sum seinastu tíðina er komin fram í sambandi við fiskarílógirnar og treytirnar fyri projektinum í hesum sambandi”.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur seg ikki skilja grundgevingarnar hjá reiðaranum, tí Atlantic Navigator hevur júst tey rættindi, sum hann hevði, tá ið hann kom í flotan.

- Atlantic Navigator fiskar av felagskvotu, og eg haldi avgjørt ikki, at grundgevingin hjá reiðaranum er røtt.

Hinvegin hevur landsstýrismaðurin skilt, at prísirnir á surimi ikki hava verið so góðir, sum roknað hevur verið við, at teir fóru at vera.

- Men eg havi eisini skilt, at prísirnir nú vóru betri aftur, leggur hann aftrat.



*- Fiskimálaráðið hevur enn einki formelt fingið at vita um, at Atlantic Navigator fer úr flotanum – og um annað skip kemur í staðin, og tí havi eg ongan hug at gera viðmerkingar til kvotuviðurskiftini hjá felagnum í framtíðini, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Bjørn harmast

Landsstýrismaðurin sigur seg vera sera harman um, at manningin er uppsøgd, og at felagið nú ætlar at taka skipið úr aftur føroyska fiskiskipaflotanum.

- Hetta er ein avgerð, sum felagið hevur tikið og ein avgerð, sum vit ikki kunnu gera nakað við.

Um ætlaðu fiskivinnulógirnar, sigur landsstýrismaðurin, at hesar eru ikki komnar í gildi enn, men hann dugir ikki at síggja, at hesar skulu verða nøkur forðing fyri framhaldandi vinnu hjá Atlantic Navigator undir føroyskum flaggi.

- Helst er tað so, at felagið sær størri møguleikar í Suðuríshavinum, har hetta skipið verður mett at vera væl egnað, og tí er tað hugstoytt, at felagið gevur landsstýrinum skyldina fyri avgerðina. Eg haldi avgjørt ikki, at høvuðsgrundgevingarnar hjá reiðarínum eru tær røttu, sigur hann.

### Einki formelt

Bjørn Kalsø sigur, at fiskimálaráðið enn einki formelt hevur fingið at vita um, at Atlantic Navigator fer úr flotanum, og tí hevur hann heldur ongan hug at gera viðmerkingartilkvotuviðurskiftini hjá felagnum í framtíðini, um felagið ikki útvegar annað skip at fiska av kvotuni.

Í gjár og í morgin segði ein av manningini, sum er við Atlantic Navigator, at landsstýrið átti at latið tey, sum eru við skipinum og hava gjørt sær royndir í hesi framleiðslu, fingið kvotuna, so virksemið, ið lunnar nú eru lagdir undir, kann halda fram umborð á øðrum skipi.

Men hetta hevur lands-



*Nýggja havnin í Oyrunum á Toftum er rúmlig, og her fáa bátarnir eisini landstreym*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bátafestivalur verður a

**- Fyri at gera tiltakið so hugnaligt fyri so mong sum gjørligt, fara vit at skipa fyri alskyns tiltøkum á bryggjuøkinum, bæði fyri børnum og vaksnum, sigur Bátafelagið á Toftum**

BÁTASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Aftur í ár verður skipað fyri bátafestivali á Toftum. Í ár verður festivalurin – ella bátastevnan – sum hon vanliga verður rópt, leygardagin 5. mai.

Festivalurin á Toftum er samstundis “startskotið” til teir mongu festivalarnar av hesum slagi, sum eru um landið, tá ið summarið stundar til.

Hetta er triðju ferð, at Bátafelagið á Toftum, sum ikki hevur so mong ár á baki, bjóðar til stevnu, har Skálafjørðurin og Toftir verða sett í fokus.

Í Oyrunum er bygd nýggj deksbátahavn, sum eisini í fjør vísti seg at roynast væl til slík tiltøk, tá ið bátar úr stórum parti av landinum stevna til bryggju.

Í havnini er rúmligt, og her er eisini landstreymur.

Bátafestivalurin á Toftum verður fyriskipaður á bryggjuøkinum, og tað er eisini her, at gestirnir verða móttiknir, tá ið teir koma í havn – við hornatónleiki, undirhaldi og góðari suppu.

- Vit hava ætlanir um at víðka tiltakið í ár, soleiðis at pláss eisini verður at seta húsvognar, og soleiðis ætla vit eisini at bjóða hesum bólki av frítíðaríðkarum